## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt men mjørki í støðum. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og suðri og sirm ella mjørki í støðum. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og møguliga regn. Sunnudagin minni vindur og sólglottar, men okkurt ælið. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Elisabeth Pike í Ribarhúsi

**Hósdagin 5. juni letur listakvinnan Elisabeth Pike upp eina málningaframsýning í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði.**



Elisabeth er føroysk, men hevur búð í Toronto í Kanada síðan 1970. Hon hevur havt listaframsýningar nógvastaðni kring heimin og eisini nógvar í Føroyum.

Á málningaframsýningini í Fuglafirði verða meira enn 20 málningar sýndir fram. Myndevnini eru ymisk, tó mest kvinnur.

Elisabeth skal eisini hava aðrar framsýningar í summar. 1. juli letur hon upp eina framsýning í Klaksvík í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá Klaksvíkar kommunu, og frá 7. til 14. august hevur hon framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Til ferniseringina 5. juni, sum verður frá kl. 15 – 19, spæla tey á kamarinum.

Listakvinnan verður at hitta á framsýningini til og við sunnudagin 8. juni.

**Opið er soleiðis:** Mánadag til fríggjadag frá kl. 15-17.30, leygardag frá kl. 11-13 og sunnudag frá kl. 15-17.30.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 14 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 26 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 19 |
| New York | 23 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og dýpist.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer spakuliga í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/5 kl. 06[00] – 26/5 06[00]. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í juni: -9,9° - Mesti hiti máldur í juni: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 25/5 kl. 06[00] – 26/5 06[00].
Avfallið higartil í juni: 15 mm




I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

3. juni — Tendring / Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. juni | 6:34 | 19:03 | 5:34 | 18:03 | 5:49 | 18:18 | 8:34 | 21:03 | 9:34 | 22:03 | 4:49 | 17:18 | 3:49 | 16:18 | 6:49 | 19:18 | 7:49 | 20:18 | 6:19 | 18:48 | 7:34 | 20:03 |
| 4. juni | 7:35 | 20:08 | 6:35 | 19:08 | 6:50 | 19:23 | 9:35 | 22:08 | 10:35 | 23:08 | 5:50 | 18:23 | 4:50 | 17:23 | 7:50 | 20:23 | 8:50 | 21:23 | 7:20 | 19:53 | 8:35 | 21:08 |
| 5. juni | 8:39 | 21:11 | 7:39 | 20:11 | 7:54 | 20:26 | 10:39 | 23:11 | 11:39 | - | 6:54 | 19:26 | 5:54 | 18:26 | 8:54 | 21:26 | 9:54 | 22:26 | 8:24 | 20:56 | 9:39 | 22:11 |
| 6. juni | 9:41 | 22:11 | 8:41 | 21:11 | 8:56 | 21:26 | 11:41 | - | 0:11 | 12:41 | 7:56 | 20:26 | 6:56 | 19:26 | 9:56 | 22:26 | 10:56 | 23:26 | 9:26 | 21:56 | 10:41 | 23:11 |
| 7. juni | 10:38 | 23:05 | 9:38 | 22:05 | 9:53 | 22:20 | 0:11 | 12:38 | 1:11 | 13:38 | 8:53 | 21:20 | 7:53 | 20:20 | 10:53 | 23:20 | 11:53 | - | 10:23 | 22:50 | 11:38 | - |